# Kjak



Arne Winthereig

## Fundamentalist ella anarkist, tú velur!

Nógv kjak er komið, eftir at fleiri ungmannafeløg og harvið eisini Ungmannafelagið Samband fóru undir at viðgera mál um rúsdrekka, samkynd og so víðari. Tað tykist, sum vit eru í einum kampi, har tað er spurningurin, um vit blíva kristnir fundamentalistar ella anarkistar.

Ungmannafelagið Samband heldur, at kjakið um hesi mál hevur fingið ein skeivan rætning. Í staðin fyri at tosa um, at tað skal vera pláss fyri øllum í okkara samfelag, og at øll skulu góðtakast, homo- og heteroseksuel, kristin og vantrúgvandi, konufólk og mannfólk o.s.fr. snýr kjakið seg um, hvussu einstøk ung bróta niður allan kristindóm í landinum.

Um treytin fyri at vit skulu vinna rættvísi til øll fólk uttan mun til húðarlit, seksuella orientering, kyn og politiskan lit er, at vit verða skýrd at avkristna Føroyar, so má tað verða so og tekur millum annað Ungmannafelagið Samband, fulla ábyrgd fyri at syrgja fyri hesum. Vit vilja undir ongum umstøðum góðtaka, at ávísir samfelagsbólkar ikki fáa innivist í samfelagnum. Ei heldur verður góðtikið, at hesi liva undir øðrvísi korum enn vit onnur. Vit eru øll borgarar í Føroyum.

### Bill Justinussen kennir allan ungdóm

Tá Bill Justinussen í sendingini Refleksjón sigur seg kenna allan ungdóm, so ljóðar tað løgið. Sambært Bill Justinussen umboða fýra ungmannafeløg ein lítlan minniluta, meðan Bill Justinussen kennir ein meiriluta av ungdóminum, og tey hava eina aðra fatan. Hóast Bill Justinussen kennir so nógv ung er vert at bíta merki í, at Miðflokkurin ikki sjálvur megnar at manna eitt ungmannafelag.

Mótreaktiónin, sum Bill Justinussen tosar um, er júst tað, ið hendir. Ungdómur vil ikki standa modell til, at ávísir samfelagsbólkar ikki fáa innivist í okkara samfelag. Hetta er ikki ein hugsan, ungdómurin kann standa inni fyri.

Fyri at ungdómur skal trívast í einum landi, skulu karmarnir vera fyri tí. Ávísir politikarar, har ímillum Bill Justinussen, vilja, við at lóggeva ímóti ávísum bólkum í samfelagnum, bróta niður teir karmar, sum skulu fáa ung at venda heimaftur at búseta seg. Ungmannafeløgini hava ligið still, og tískil hevur einki mótspæl verið, og snævur skygdar hugsanir hava fingið frítt spæl. Henda tíðin er vónandi farin, og vit kunnu aftur liva í einum fólkaræði, har pláss er fyri mær og tær og okkum



Uni Arge

## Málsligar stíllegur og annað trætigóðs

Sjúrður Skaale endurtekur í aftursvari til tíðargrein hjá mær, at bókstavirnir x, q, z, w og c verða mangan brúktir í føroyskum fólkanøvnum og av og á í landanøvnum. Tað vita øll. Men hvussu fara vit at stava sitrón, meksikanari og sjokuláta, tá stavirnir eru vorðnir fullgildugir føroyskir stavir? Tann spurningurin er framvegis ósvaraður.

Í veruleikanum kundu lesarabrøv verið skrivað um málsligar spurningar í allar ævir, tí mál er mangan ein spurningur um stíl. Onkrum dámar betur ein altjóðagjørdan stíl, kanska tí Mexico virkar meira fínt og myndugleikakent enn Meksiko, ella tí viðkomandi hevur lært úr donskum og enskum lærubókum í skúlanum.

Stíllegur eru so ymiskar, sum fólk eru, og ómøguligt er at semjast um stíl, tí stílur sprettur úr persóninum sjálvum og tí, sum hann ella hon hevur havt fyri sínum eygum alla sína livitíð.

Sjúrður Skaale má og skal skriva Mexico og ikki Meksiko, sigur hann, men skal hann so skriva mexicanari og mexicanska markið? Hví vil hann ikki skriva meksikanari og meksikanska markið eftir vanligum føroyskum stavsetingarhátti? Vil hann broyta føroyska stavseting?

Hetta er bara tað, eg havi spurt hann nakrar ferðir. Stílurin hjá Sjúrði hevur nú elvt til mikið orðaskifti um stavrað og stavseting, og tað hevur hann, tí Sjúrður sum løgtingsmaður legði uppskot fram um at broyta stavraðið. Hann ætlaði at hevja landsins politikarar upp til at vera málfrøðingar!

Men tíbetur er løgtingið so mikið at sær komið, at tað veit, at Føroyar eiga veruligar málfrøðingar, og tí fekk Sjúrður Skaale sítt uppskot um stavraðið aftur í fangið ósamtykt. Løgtingið gjørdi í staðin av at seta niður eitt málráð at taka sær av bókstavum, máliskum og øðrum meira yvirskipaðum málspurningum.

Og hetta var gott, tí har hoyra tílíkir spurningar heima. Fakkunnleikin skal gera av, hvat ráðiligt er at gera og broyta í málspurningum. Fakkunnleikin kann best rokna út avleiðingarnar av broytingunum. Og hetta er eisini tað, sum fakkunnleikin sjálvur vil sleppa at gera.

Í november í fjør skrivaði Jógvan í Lon Jacobsen, málnevndarformaður, eina hugvekjandi tíðargrein um støðuna hjá føroyskum í altjóðagerðini. Greinin var sprottin úr orðaskiftinum um stavraðið, og boðskapurin í endanum á greinini var greiður. Hann skrivaði:

»Mín bøn til politikararnar skal tí vera: Latið málpolitikararnar sleppa at avgera spurningin um stavraðið, og brúkið tit heldur orkuna upp á at orða ein yvirskipaðan málpolitikk, har tit greitt siga, hvat tit ætla at gera fyri at styrkja og menna tað føroyska málið, so tað kann standa seg í kappingini móti enskum og donskum, og latið pengar fylgja við.«

Hetta er væl sungið, haldi eg.

Helgi Abrahamsen

*Strendur*



## Veðrið avlýst vegna fíggjarligt óveður

Bara eitt ár eftir at veðrið varð yvirtikið sum føroyskt málsøki, manglar landskassanum pengar, fyri at kunna halda avtaluna við danska veðurstovnin DMI.

Einaferð fóru nakrir politikarar undir at yvirtaka veðrið. Hetta var í teimum døgunum, tá CHE-samgongan ráddi fyri borgum. Nógvar yvirtøkur stóðu á skránni hjá samgonguni, og sjálvandi valdu tey at raðfesta tær bíligastu yvirtøkurnar fyrst. Tað dýrasta skuldi bíða til móti endanum á valskeiðinum, tí so kundi onkur annar arva tað fíggjarliga upptakið.

Yvirskriftin í samgonguskjalinum var "Samhaldsfesti, sjálvstýri, møguleikar og menning" - so hví ikki byrja við at yvirtaka veðrið?

Øll tey freku útsynningsælini, sum í áravís høvdu skolað inn yvir oyggjarnar á donskum, skuldu nú hava føroyskar regndropar, og møguleikin var eisnin nevndur, at Fróðskaparsetrið skuldi kunna granska føroyska veðurlagið. Men annars hendi ikki so nógv í sambandi við yvirtøkuna. DMI (Dansk Meteorologisk Institut) skuldi framvegis gera veðurmátingarnar, eingin bleiv settur í starv og tænastan bleiv heldur ikki betri. Tað einasta sum í roynd og veru bleiv yvirtikið, var sjálv rokningin. Nú skuldu føroyingar sleppa at gjalda fyri tænastuna.

Og so gongur eitt ár, og nú er longu galið, tí nú mangla pengar. Fíggjarliga óveðrið rakti fyrri enn yvirtiknu brúgvaløgini, og tí mugu vit bara góðtaka at fáa nakrar føroyskar regndropar, sum vit ikki hava goldið fyri. Kanska eitt syndur óheppið, tá hugsað verður um yvirskriftina "Samhaldsfesti, sjálvstýri, møguleikar og menning", men ein ælabogi við føroyskum litum, er jú ikki at forsmáa.

### Yvirtøkur við ongum endamáli

Hvørja ferð samgongusamráðingar eru, spælir spurningurin um yvirtøkur ein avgerandi leiklut, tí flokkarnir á loysingarveinginum mugu fyri ein og hvønn prís sleppa at yvirtaka – um tað so bara er okkurt. Og so endar tað við, at mál sum ongan týdning hava, verða yvirtikin, ella uppaftur verri: Mál verða yvirtikin, sum als ikki eru búgvin til eina yvirtøku.

Tíðin má vera komin, hvar ið vit, heldur enn bara at yvirtaka fyri at yvirtaka, seta okkum sum mál at fáa alt tað at virka, sum longu er yvirtikið.

Veðrið var ein av teimum bíligu yvirtøkunum, so skaðin er kanska ikki so stórur. Men tá vit ikki klára at gjalda eina so lítla yvirtøku, hvussu hevði støðan so verið, um vit yvirtóku okkurt av teimum størru málsøkjunum?

Gott var, at vit sluppu av við CHE-samgonguna áðrenn hon fór í holt við tær størru yvirtøkurnar, sum stóðu í samgonguskjalinum, tí tær kundu skjótt endað sum ein vanlukka.